## Børn læra burðardygd

Hesa vikuna gera grønlendingar nógv burtur úr týdninginum at tryggja burðardygd í náttúruni. Málsetningurin, sum øll skúlabørn og barnagarðsbørn læra, er, at tey villu dýrini í náttúruni skulu gagnnýtast, men við tí í huga, at tey eisini skulu varðveitast. Eitt nú koma fiskimenn í skúlar og barnagarðar at greiða frá ymsum fiskasløgum, og hvørjum tey liva av. Tiltakið um burðardygd er í kommununum Nuuk, Qaqortoq, Ilulissat og Upernavik.



# 4,4 kilometrar av landsvegi fyri 60 mió kr.

**Oyvindur Brimnes, stjóri í Landsverki, sigur, at Strandavegurin liggur væl í lendinum og er góður at koyra eftir. - Men verkætlanin er vorðin dýrari og er seinni komin til samfelagsliga nyttu, tí játtanin hevur gingið yvir so nógv ár, sigur hann**

STRANDAVEGUR
*Orð: Vilmund Jacobsen*
*Myndir: Hans Jákup Johannesen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Strandavegurin er alment tikin í nýtslu. Hetta hendi við hátíðarhald á Skála leygardagin, har nógv fólk vóru samankomin. Umframt umboð fyri Landsverk, landsstýrið, byggiharrar og kommunur, skipaðu ítróttarfeløg á vestara armi á Skálafjørðinum fyri, at ung sum eldri fingu høvi at ganga ella renna eftir vegnum, áðrenn snórurin varð kliptur, og vegurin soleiðis alment varð tikin í nýtslu.

Tiltakið byrjaði á Strondum klokkan 12, tá ið fólk, sum vóru við í heilsurenningini hjá feløgunum, runnu ella gingu eftir nýggja vegnum av Strondum og inn á Skála.

### Bjarni klipti snór

Umleið klokkan 13, tá ið øll vóru komin fram eftir tí 4,4 kilometra langa vegnum, klipti landsstýrismaðurin, Bjarni Djurholm, snórin, og við hesum var Strandavegurin alment tikin í nýtslu.

Við hátíðarløtuna Skálamegin segði stjórin í Landsverki, Oyvindur Brimnes, nøkur orð.

Hann segði, at Strandavegurin sambært samferðsluætlanini er ein partur av okkara høvuðsvegakervi.

Stjórin vísti á, at enn er tann parturin eftir at gera, sum skal ganga úr landsvegnum sunnanfyri bygdina í Skálafirði, niðan um bygdina við íbinding í landsvegin nakað norðanfyri Statoil-støðina í Skálafirði.

Eftir at snórurin varð kliptur, og Oyvindur hevði hildið eina stutta røðu, fór bilafylgið eftir nýggja vegnum.

Fremstir í røðini vóru borgarstjórarnir í Runavíkar kommunu og Sjóvar kommunu, Hans Jacob Lamhauge og Malena Thomsen, og síðan landsstýrismaðurin í samferðslumálum, Bjarni Djurholm og umboð fyri Landsverk við stjóranum, Oyvindi Brimnes, á odda.

Eftir teimum koyrdi so bilafylgið - av Skála, út á Strendur og heimaftur á Skála, har hátíðarhaldið helt fram í Ítróttarhøllini.

Við løtuna í Ítróttarhøllini hildu Bjarni Djurholm, Hans Jacob Lamhauge og Malena Thomsen eisini røðu.

Landsverk stóð fyri móttøkuni í Ítróttarhøllini, har ymiskt ábit og leskandi var at fáa.

### Dýrari landsvegur

Oyvindur Brimnes sigur, at Strandavegurin ikki er heilt liðugur enn. Nakað er eftir at gera við íbindingarnar, bæði Strandamegin og Skálamegin. Tað er felagið Articon, ið hevur gjørt hendan seinasta partin av vegnum, og tað er soleiðis eisini Articon, sum ger íbindingarnar í báðum endunum lidnar.

- Síðan vit byrjaðu upp á hesa vegagerðina, er arbeiðið boðið út tríggjar ferðir. Tað merkir, at vegurin er bygdur í trimum umførum.

Stjórin í Landsverki ásannar, at tað hevur gjørt Strandavegin væl dýrari, at arbeiðið er gjørt yvir so nógv ár.

- Vit hava ikki havt nóg stóra játtan til at gera hetta arbeiði í einum, og tað er altíð dýrari at byrja eitt arbeiði, steðga á aftur og so byrja aftur – upp í fleiri ferðir. Hetta ger eisini, at vegurin seinni kemur til samfelagsliga nyttu, sum í hesum førinum, sigur hann.

Oyvindur Brimnes sigur, at samlaði kostnaðurin av nýggja landsvegnum, sum er 4,4 kilometrar langur, liggur um 60 miljónir krónur.

- Vegurin er 7 metrar breiður við hálvum øðrum metri vegøksl hvørju megin, og soleiðis er samlaða breiddin 10 metrar.

Stjórin sigur, at feløgini, sum hava verið við í hesi vegabygging, eru Byggitek, MT Højgaard og nú Articon.

Tað er felagið HMP Consult, sum hevur staðið fyri projekteringini fyri Landsverk.



*Heilsurenningin eftir nýggja vegnum byrjaði á Strondum og endaði á Skála*



*Hesin var eisini við í heilsurenningini*



*Stjórin í Landsverki, Oyvindur Brimnes, heldur røðu, og Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, klippir snórin*



*Nógv fólk vóru til hátíðarhaldið, tá nýggi Strandavegurin læt upp alment leygardagin*